

www.oljan.fo

**Jan Müller** 24 - 09 - 2011

# Saeborg komin til Føroya

Nýggjasta farið í flotanum, útgerðarskipið hjá Supply Service, Saeborg er komið til Føroya. Skipið hevur ligið í oljuhavnini í Runavík og riggað til hátíðarhaldið, sum verður á Vestaru Bryggju í Havn í dag klokkan 14. Túrurin til Føroya gekk sera væl og eru tey væl nøgd við skipið. Í dag fer Jóhanna Rasmussen at doypa skipið og eftir tað er opið skip, har fólk kunnu síggja hetta stásiliga skipið, sum er tað næsta í flotanum hjá Supply Service. Nýggja Saeborg í Rúnavík. Mynd Eli Lassen.